# NÁMSSKIPAN

# FYRI

# ALIÚTBÚGVINGINA

YRKIS
depilin

Útgávudagur 10. oktober 2024

# Innihald


1. Um útbúgvingina ... 3

2. Førleikamál við útbúgvingarlok og verklig lærumál ... 3

  2.1 Førleikamál við útbúgvingarlok ... 4

  2.2 Verklig lærumál ... 5

3. Útbúgvingartíð, bygnaður og innihald ... 7

  3.1 Nærri um almennar lærugreinar ... 10

    3.1.1 Førleikamál fyri almennar lærugreinar ... 11

  3.2 Nærri um vallærugreinar ... 12

  3.3 Nærri um yrkislærugreinar ... 12

  3.4 Serskeið ... 13

4. Eftirmeting av skúlaskeiðum ... 14

5. Sveinaroynd ... 15

  5.1 Ástøðiligi parturin av sveinaroyndini ... 15

  5.2 Verkligi parturin av sveinaroyndini ... 17

  5.3 Endaligt sveinaroyndarpróvtal ... 19

6. Endurpróvtøkur og sjúkrapróvtøkur ... 20

7. Kærumøguleikar ... 20

8. Gildiskoma ... 20

9. Námsætlanir til yrkislærugreinar í aliútbúgvingini ... 21

  Námsætlan 1. Aling av fiski ... 22

  Námsætlan 2. Alitøkni ... 27

  Námsætlan 3. Trygd og trygdarfatan ... 31

  Námsætlan 4. Burðardygg gagnnýtsla ... 35

  Námsætlan 5. Alibúskapur ... 39

# Námsskipan fyri yrkisútbúgving innan aling á sjógvi og landi

| Námsskipan fyri aliútbúgvingina, seinast dagførd 10.10.2024.<br>Yrkisnevndin hevur samtykt hesar útbúgvingarreglur sambært yrkisútbúgvingarlógini og útbúgvingarkunngerð nr. 116 frá 15. august 2022 um yrkisútbúgving innan aling á sjógvi og landi. | |
|---|---|
| **Fyrisiting hjá Yrkisnevndini** | **Skúlin, sum bjóðar skúlagongdina í útbúgvingini:** |
| **Yrkisdepilin**<br>Hoydalsvegur 1<br>100 Tórshavn<br>Telefon 30 65 60<br>www.yrkisdepilin.fo<br>yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo | **Miðnám í Vestmanna**<br>Fjarðarvegur 4<br>350 Vestmanna<br>Tlf. 424573<br>www.miv.fo<br>miv@miv.fo |
| Til ber at venda sær til Yrkisdepilin og skúlan við spurningum um útbúgvingina og fyri at fáa meiri kunning um útbúgvingina.<br><br>Um ósamsvar er millum námsskipanina og útbúgvingarkunngerðina, so er tað altíð útbúgvingarkunngerðin, sum er galdandi. | |

## 1. Um útbúgvingina

Endamálið við útbúgvingini er ásett í kapitli 1 í útbúgvingarkunngerðini.

Útbúgvingin sum alari tekur 4 ár, og er lutað sundur í verkliga læru á góðkendum læruplássi og skúlagongd í góðkendum yrkisskúla.

## 2. Førleikamál við útbúgvingarlok og verklig lærumál

Førleikamálini fyri tað, ið lærlingurin skal duga við lokna útbúgving eru ásett í § 9 í útbúgvingarkunngerðini og endurgivin niðanfyri. Í námsskipanini verða førleikamálini fyri útbúgvingina knýtt at lærugreinum í skúlunum og at verkligu lærumálunum fyri læruplássini. Verkligu lærumálini eru ásett í parti 2.1 og lærumálini fyri hvørja lærugrein sær í parti 9.

## 2.1 Førleikamál við útbúgvingarlok

Førleikamálini fyri alaraútbúgvingina eru ásett í § 9 í útbúgvingarkunngerðini og eru hesi:

1) At útinna dagliga røkt av aliverum í øllum pørtum av framleiðslugongdini, í tráð við galdandi regluverk, herundir fyri djóravælferð og umhvørvi.
2) At taka upp, handfara og beina fyri deyðum fiski á tryggan hátt og í mun til galdandi regluverk.
3) At taka royndir av fiski og fóðri, skjalfesta rakstrarviðurskifti og umhvørvisviðurskifti, og seta í verk tiltøk, ið eru grundað á eygleiðingar og mátingar.
4) At greiða frá og brúka framleiðslustýringar.
5) At greiða frá prinsippunum í resirkuleringsanleggum.
6) At menna fóðringina og duga at nýta eina fóðurskipan.
7) At hava eftirlit við vøkstur og menningarstig hjá aliveru.
8) At viga aliverur fyri at finna miðalvektina.
9) At eyðmerkja sjúkutekin hjá aliverum.
10) At greiða frá mest vanligu smittukeldunum í sambandi við fiskasjúkur og hvussu smittuspjaðing kann fyribyrgjast.
11) At fyrireika og hjálpa við koppsetingum av aliverum.
12) At kanna fyri snultidjórum og fremja eina lúsateljing.
13) At greiða frá hættum at fyribyrgja parasittum í aliringum, og at útinna viðgerð móti parasittum.
14) At duga at handfara kóp og onnur djór, sum amast upp á alibrúk.
15) At sóttreinsa, eftirkanna og viðlíkahalda útgerð og høli eftir galdandi viðlíkahaldsætlan.
16) At eftirkanna og viðlíkahalda tekniska framleiðsluútgerð á einum alibrúki sambært forskriftunum.
17) At handfara burturkast samsvarandi galdandi reglum.
18) At brúka útgerð, at lossa, lasta og sleipa í alianleggum og á alibátum á tryggan hátt og í mun til galdandi regluverk.
19) At greiða frá, hvussu rák, alda, veður og vindur ávirka arbeiðsumstøðurnar á sjónum.
20) At brúka databløð fyri heilsu, trygd og umhørvi, og at nýta kravda verndarútgerð og trygdarútgerð, og at vera ílatin eftir umstøðunum.
21) At fremja arbeiðsuppgávur í alianleggum á ergonomiskt rættan hátt.
22) At eyðmerkja tey viðurskifti í framleiðslugongdini, sum serliga kunnu ávirka framleiðslukostnaðin.
23) At arbeiða sambært galdandi góðskuskipan, innaneftirliti sertifiseringskrøvum og standardum.

## 2.2 Verklig lærumál

Eitt virki skal lúka ávís verklig lærumál fyri at fáa læruplássgóðkenning. Førleikamál fyri lærugreinar og verkligu lærumálini skulu tryggja, at lærlingur eftir lokna útbúgving lýkur ásettu førleikamálini fyri útbúgvingina. Í talvu 1 eru verkligu lærumálini fyri alaraútbúgvingina ásett.

*Talva 1. Verkligu lærumálini fyri alaraútbúgvingina*

| **Mál fyri verkligu læruna** |
|---|
| |
| **Aling av fiski og øðrum lívverum** |
| Virkið skal hava í minsta lagi 4 av hesum uppgávum: |
| 1. Útinna dagliga røkt av aliverum í øllum pørtum av framleiðslugongdini í tráð við galdandi regluverk, herundir fyri djóravælferð og umhvørvi, |
| 2. Taka upp, flyta og levera aliverur (alifisk), |
| 3. Kontrollera vøkstur og menningarstig hjá aliveru, |
| 4. At viga aliverur fyri at finna miðalvektina og |
| 5. Kanna fyri parasittar og fremja eina lúsateljing. |
| |
| Virkið skal hava í minsta lagi 2 av hesum uppgávum: |
| 1. Eyðmerkja sjúkutekin hjá aliverum, |
| 2. Kenna arbeiðsgongdir og vanligar smittukeldur fyri fiskasjúkur og hvussu smittuspjaðing kann fyribyrgjast, |
| 3. Fyrireika og hjálpa við koppsetingum av aliverum, |
| 4. Greiða frá hættum at fyribyrgja parasittum í aliringum, og at útinna viðgerð móti parasittum og |
| 5. Duga at handfara kóp og onnur djór, sum amast upp á alibrúk. |
| |
| **Alitøkni og anlegg** |
| Virkið skal hava í minsta lagi 4 av hesum uppgávum: |
| 1. Arbeiða við framleiðslustýringum, |
| 2. Halda resirkuleringsanlegg við líka, |
| 3. Optimera fóðringina og duga at nýta eina fóðurskipan, |
| 4. Dagligt viðlíkahald, sóttreinsing, eftirkanna og viðlíkahalda útgerð og høli eftir galdandi viðlíkahaldsætlan, |
| 5. Eftirkanna og viðlíkahalda tekniska framleiðsluútgerð á einum alibrúki sambært forskriftunum og |
| 6. Føra alibát, fremja dagligt eftirlit og viðlíkahald av alibátinum og brúka útgerð umborð á tryggan hátt og eftir galdandi regluverki. |
| |
| Virkið skal hava í minsta lagi 2 av hesum uppgávum: |
| 1. Handfara burturkast samsvarandi galdandi reglum, |
| 2. At greiða frá, hvussu rák, alda, veður og vindur ávirka arbeiðsumstøðurnar á sjónum og |
| 3. Brúka vanliga talgilda útgerð í aliframleiðsluni. |
| |

| **Trygd** |
|---|
| 1. Virkið skal hava í minsta lagi 3 av hesum uppgávum: |
| 2. At brúka útgerð at lossa, lasta og sleipa í alianleggum og á alibátum á tryggan hátt og í mun til galdandi regluverk, |
| 3. At greiða frá, hvussu rák, alda, veður og vindur ávirka arbeiðsumstøðurnar á sjónum |
| 4. Brúka databløð fyri heilsu, trygd og umhvørvi, og at nýta kravda verndar- og trygdarútgerð, og at verða ílatin eftir umstøðunum, |
| 5. Fremja arbeiðsuppgávur í alianleggum á ergonomiskt rættan hátt |
| |
| **Burðardygg gagnnýtsla** |
| Virkið skal hava í minsta lagi 2 av hesum uppgávum: |
| 1. Taka upp, handfara og beina fyri deyðum fiski á tryggan hátt og í mun til galdandi regluverk, |
| 2. At duga at handfara kóp og onnur djór, sum amast upp á alibrúk. |
| 3. At handfara burturkast samsvarandi galdandi reglum. |
| |
| **Alibúskapur** |
| Virkið skal hava í minsta lagi 3 av hesum uppgávum: |
| 1. Eyðmerkja tey viðurskifti í framleiðslugongdini, sum serliga kunnu ávirka framleiðslukostnaðin |
| 2. Arbeiða sambært galdandi góðskuskipan, innaneftirliti, sertifiseringskrøvum og standardum (megatrends). |
| 3. Brúka eina framleiðsluætlan í dagliga arbeiðinum í einum alianleggi, |
| 4. At taka royndir av fiski og fóðri, skjalfesta rakstrar- og umhvørvisviðurskifti, og seta í verk tiltøk, ið eru grundað á eygleiðingar og mátingar, |
| 5. Arbeiða við yvirskipaðu krøvunum, sum marknaðurin setir til alivørur, |

# 3. Útbúgvingartíð, bygnaður og innihald

Útbúgvingin tekur 4 ár og skúlagongdin í útbúgvingini er tilsamans 60 vikur, íroknað eitt sveinaroyndartíðarskeið. Skúlagongdin er lutað sundur í 3 skúlaskeið og eitt sveinaroyndarskeið, og verður skipað samsvarandi talvu 2.

*Talva 2: Skipan av skúlagongd og longd á skúlaskeiðum*

| Skúlaskeið | Vikur | Pultstímar |
|---|---|---|
| 1. skúlaskeið | 20 | 700 |
| 2. skúlaskeið | 20 | 620 |
| 3. skúlaskeið | 10 | 355 |
| Sveinaroyndarskeið | 10 | 300 |
| Tilsamans | 60 | 1975 |

Felagskunngerðin (nr. 83 frá 2013) ásetur sambært § 6, stk. 1, pkt. 2, at skemalagda undirvísingarvirksemið í mesta lagi fevnir um 36 pultstímar um vikuna, tvs. at eitt skúlaskeið á 20 og 10 vikur í mesta lagi hevur ávikavist 720 og 360 pultstímar.

Útbúgvingarkunngerðin ásetur, at útbúgvingin byrjar við upplæring á læruplássi í 3 mánaðir, tvs. áðrenn 1. skúlaskeið byrjar, at upplæring á læruplássi millum 1. og 2. skúlaskeið er 8 mánaðir, at upplæring á læruplássi millum 2. og 3. skúlaskeið er 8,5 mánaðir, og at upplæring á læruplássi millum 3. skúlaskeið og sveinaroyndartíðarskeið er 10 mánaðir.

Skúlagongdin í útbúgvingini fevnir um almennar lærugreinar, yrkislærugreinar og vallærugreinar sambært ávíkavist §§ 5 og 6 í útbúgvingarkunngerðini. Harumframt eru krøv um serskeið ásett sbrt. § 8, sí nærri í parti 3.4. Skúlaundirvísingin skal í byrjanini geva eina breiða heildarfatan og seinni miðar undirvísingin ímóti at veita lærlingum neyðugan førleika í ávísum yrki (§ 11, stk. 2 í yrkisútbúgvingarlógini).

Lærugreinar verða allýstar við einum lærugreinastigi, sí nærri í 3.1 – 3.3, og nærri lýstar við innihaldi og førleikamálum í námsætlanunum í parti 9.

Í útbúgvingarkunngerðini er ásett klokkutímatøl fyri almennar lærugreinar hvør sær og samlaða talið av klokkutímum fyri yrkislærugreinar. Skemlagda klokkutímatalið fyri almennar lærugreinir eru sambært § 5, stk. 1 í útbúgvingarkunngerðini 335 klokkutímar (447 pultstímar), har klokkutímatalið er 75 (100 pultstímar) fyri Evnafrøði C, Lívfrøði C og Enskt C og 55 (73 pultstímar) fyri Støddfrøði E og Føroyskt E. Harumframt er ásett krav um tvær almennar vallærugreinar á E stigi. Tó kann lærlingur velja at fara frá Føroyskum og Støddfrøði E til C samstundis sum tímatalið fyri vallærugreinar verður lækka samsvarandi. Skemalagda tímatalið til yrkislærugreinar, íroknað sveinaroyndartíðarskeið er til samans 1.050 klokkutímar sambært § 6, stk. 1 (1.400 pultstímar). Klokkutímatalið verður umroknað til pultstímatal (klokkutímar x 1 1/3 = pultstímar), sí yvirlit fyri pultstímatøl í talvu 3.Í talvu 3 er yvirlit yvir lærugreinar og talvan vísir í hvørjum skúlaskeiði frálæran í ymisku lærugreinunum fer fram og býtið av pultstímatølum. Býtið av lærugreinum millum skúlaskeiðini er lagt soleiðis til rættis, at undirvísingin í mest møguligan mun styðjar verkliga partin av útbúgvingini.

*Talva 3. Yvirlit og skipan av lærugreinum í útbúgvingini*

| **Lærugrein** | **Stig** | **Pultstímar** | **1. skúlaskeið** | **2. skúlaskeið** | **3. skúlaskeið** | **4.sveinaroynd** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Almennar lærugeinar** | | | | | | |
| Evnafrøði | C | 100 | 40 | 60 | | |
| Lívfrøði | C | 100 | 40 | 60 | | |
| Enskt | C | 100 | 40 | 60 | | |
| Støddfrøði | E/C[1] | 70 | 70 | | | |
| Føroyskt | E/C[1] | 70 | 70 | | | |
| Vallærugrein 1 | E | 70 | | 35 | 35 | |
| Vallærugrein 2 | E | 70 | | 35 | 35 | |
| Í alt | | 580 | 290 | 220 | 70 | |
| **Yrkislærugreinar** | | | | | | |
| Aling av fiski (1) | F | 480 | 150 (B) | 150(V) | 110 (F) | 70 (F) |
| Alitøkni (2) | F | 360 | 140 (B) | 140 (V) | 40 (F) | 40 (F) |
| Trygd (3) | V | 140 | 50 (B) | 40 (V) | 50 (V) | |
| Burðardygg gagnnýtsla | V | 140 | 70 (B) | 70 (V) | | |
| Alibúskapur (5) | B | 100 | | | 50 (B) | 50 (B) |
| Í alt | | 1.220 | 410 | 400 | 250 | 160 |
| **Sveinaroynd** | | 175 | | | 35 | 140 |
| | | | | | | |
| Tilsamans | | 1975 | 670 | 650 | 355 | 300 |

1) Í 2. skúlaskeiði ber til at velja støddfrøði C og/ella føroyskt C..
2) (B) er byrjunnarstig, (V) er vanastig og (F) er frammkomið stig

Í talvu 4 sæst, hvørji útbúgvingarførleikamál sambært parti 2.1 yrkislærugreinirnar styðja. Tølini vísa til málpinnarnar í yvirlitinum.

*Talva 4. Yrkislærugreinar og útbúgvingarførleikamálini*

| Fakligt øki | Lærugreinaevni | Førleikamál við lokna útbúgving |
|---|---|---|
| **Aling av fiski og øðrum lívverum** | *Fiskalívfrøði*<br>– grundleggjandi anatomi og fysiologi | 1, 3 |
| | *Fiskaheilsa og fiskavælferð*<br>– fiskasjúkur, smittuspjaðing, trivnaður, parasittar v.m. | 1, 2, 3, 9, 10, 11, 12, 13 |
| | *Fóðring*<br>– fóðursamanseting, fóðringarskipanir, optimering av fóðring v.m. | 6, 7, 8 |
| | *Góðska á alifiski*<br>– hvat kann ávirka góðskuna? | 3 |
| | *Regluverkið kring aling av fiski*<br>– rakstrarkunngerðin, lúsakunngerðin, umhvørvisgóðkenningar, heilivágsnýtsla v.m. | 3, 17 |
| **Alitøkni** | *Framleiðslueindir fyri*<br>• rognaframleiðslu<br>• smoltframleiðslu (og RAS)<br>• matfiskaframleiðslu og<br>• alguframleiðslu | 16 |
| | *Framleiðslustýringar* | 4 |
| | *Viðlíkahald og viðlíkahaldsskipanir* | 5, 15, 16 |
| **Trygd** | *Trygdarfatan* | 18, 20, 21 |
| | *Veðurviðurskifti og streymviðurskifti* | 19 |
| **Burðardygg gagnnýtsla** | *Ávirkan frá alivinnuni á annað lív í sjónum og á havumhvørvið annars* | 14 |
| | *Handfaring av burturkasti* | 2, 17 |
| | *Orkunýtsla* | 22 |
| **Alibúskapur** | *Framleiðslukostnaður* | |
| | *Sertifiseringar*<br>– sjálvbodnar (Global GAP, ASC v.m.), - ikki-sjálvbodnar metingar (Seafood Watch) | 23 |

## 3.1 Nærri um almennar lærugreinar

Almennu lærugreinarnar fevna um ástøðiliga undirvísing, ið skal miða ímóti at menna tann almenna kunnleikan hjá lærlinginum og styðja undirvísingina í yrkislærugreinunum. Somuleiðis skulu almennu lærugreinarnar styrkja persónliga menning, lestrarførleika og samfelagsfatan.

Alaraútbúgvingin hevur hesar almennar lærugreinar:

1. **Lærugreinin evnafrøði C**
   Sí leinkja: Evnafrøði C - namsaetlanir.fo

2. **Lærugreinin lívfrøði C**
   Sí leinkja: Lívfrøði C - namsaetlanir.fo

3. **Lærugreinin enskt C**
   Sí leinkja: Enskt C - namsaetlanir.fo

4. **Lærugreinin føroyskt E**
   Sí leinki: Føroyskt - namsaetlanir.fo

5. **Lærugreinin støddfrøði**.E
   Sí leinki: Støddfrøði E - namsaetlanir.fo

6. **Vallærugreinar E** Alaraútbúgvingin hevur tvær vallærugreinar, sum skúlin bjóðar út
   Sí leinki til yvirlit yvir lærugreinir: www.namsaetlanir.fo

Lærlingur kann velja at fara frá Føroyskum og Støddfrøði E til C samstundis, sum tímatalið fyri vallærugreinar verður lækkað samsvarandi.

### 3.1.1 Førleikamál fyri almennar lærugreinar

Endamálið við almennu lærugreinunum er at viðvirka til, at lærlingurin eftir lokna útbúgving í minsta lagi skal hava hesar grundleggjandi førleikar:

1. **At duga at orða seg munnliga.** Hetta merkir, at lærlingurin skal duga at greiða frá og grundgeva fyri teimum avgerðum, sum verða tiknar, og at kjakast um ymisk uppskot og ymiskar loysnir. Lærlingurin skal eisini vera førur fyri at greiða viðskiftafólkum, myndugleikum og øðrum frá mannagongdum og vørum.
2. **At duga at orða seg skrivliga.** Hetta merkir, at lærlingurin skal duga at skriva stuttar frágreiðingar, skjalfesta og leggja fram skrivliga um mannagongdir og vørur.
3. **At duga at lesa.** Hetta merkir, at lærlingurin skal skilja nýtsluleiðbeiningar, databløð, fakligt tilfar o.t. At lærlingurin skal skilja fakligt tilfar merkir m.a., at lærlingurin skal klára at lesa rættarreglur, sum eru viðkomandi fyri arbeiðið, og at halda seg kunnaðan um gongdina í alingini í tíðarritum og á internetinum.
4. **At duga at rokna.** Hetta merkir, at lærlingurin skal duga at rokna rúmd, vídd, longd, vekt, biomassa, vøkstur, tættleika og lutfall. Harumframt skal hann vera førur fyri at gera einfaldar búskaparligar útrokningar og skilja sambandið millum fíggjarætlan og roknskap. Eisini skal lærlingurin vera førur fyri at gera einfaldar mátingar av fysiskum og kemiskum parametrum, og at seta upp og tulka einfaldar talvur, myndir/diagramm og einfalda hagfrøði.
5. **At hava talgildar førleikar.** Hetta merkir, at lærlingurin skal skilja leiklutin, sum kunningartøkni hevur í alingini. Lærlingurin skal duga at brúka talgild tól til mátingar, yvirvøku og stýring av mannagongdum og framleiðslu, fóðring, vatnhita, salinitet, pH, oxygeni og ljósi. Harumframt skal lærlingurin duga at brúka vanlig talgild amboð til at skráseta og rokna út vøkstur, felli, fóðurfaktor, og at nýta talgild kort.
6. **At hava vitan um lívfrøði.** Hetta merkir, at lærlingurin skal skilja grundleggjandi tilgongdir í lívfrøðiligum vistskipanum. Lærlingurin skal hava grundleggjandi vitan um lívið í sjónum, og skilja hugtakið burðardygd og týdningin av einari burðardyggari framleiðslu. Harumframt skal hann hava grundleggjandi vitan um mikrobiologi.
7. **At hava vitan um evnafrøði.** Hetta merkir, at lærlingurin skal skilja grundleggjandi tilgongdir í fysiskum og kemiskum skipanum, og hvussu ymisk evni samvirka.

## 3.2 Nærri um vallærugreinar

Vallærugreinarnar skulu miða eftir at nøkta áhugamál næmingsins, at stuðla áhugan fyri framhaldandi útbúgving og at menna yrkis- og lestrarførleikan. Vallærugreinarnar skulu eisini stimbra vanligu førleikakrøvini og arbeiðsmøguleikarnar í samfelagnum.
Veljast kann ímillum lærugreinar ætlaðar yrkisnámi og lærugreinar ætlaðar miðnámi.

## 3.3 Nærri um yrkislærugreinar

Yrkislærugreinarnar sermerkja læruna til alara og skulu veita kunnleika og fakligan yrkisførleika. Partar av yrkislærugreinunum eru serlærugreinar, ið eru á hægsta fakliga stigi innan yrkið, og fata tær um verkliga og ástøðiliga undirvísing, sum skal miða ímóti at veita næminginum serligan yrkisførleika sum maskinsmiður.

Førleikamátini fyri yrkislærugreinarnar eru í trimum stigum, so til ber er at gera ein karm um lýsing, skjalprógvan og sýning av stigunum og framgongdini í undirvísingini í mun til uppgávurnar. Arbeitt verður á trimum stigum, ið vísa til torleikastigini í námsætlanunum: byrjanarstig, vanastig og framkomiðstig:

***Byrjanarstig (B)***: Næmingurin dugir at loysa eina uppgávu og arbeiða í vandum førum ella út frá einum kendum greiðsluevni, ella hann dugir at gera torførari arbeiði við vegleiðing. Á hesum stigi verður dentur lagdur á persónligar førleikar til at seta seg inn í grundleggjandi kunnleika- og hegnisøki í útbúgvingini, og førleikar til at menna ábyrgd og grundarlag til framhaldandi læring. Á byrjanarstigi skal sjálvstøði somuleiðis verða grundfest í samband við at uppgávur verða loystar.

***Vanastig (V)***: Næmingurin dugir at tilrættarleggja og loysa eina uppgávu við vandum ella kendum greiðsluevnum og umhvørvi, sjálvstøðugt og í samstarvi við onnur. Á hesum stigi verður dentur lagdur á persónligar førleikar til sjálvstøðugt at seta seg inn í torskildari greiðsluevni og at samskifta við onnur um loysnirnar. Afturat hesum verður dentur lagdur á smidleika og tillagingarevni.

***Framkomiðstig (F)***: Næmingurin dugir at meta um ein trupulleika, tilrættisleggja, loysa og fremja eina uppgávu ella at loysa ein trupulleika, eisini í óvandum førum – einsamallur ella í samstarvi við onnur – við atliti at uppgávuni. Á hesum stigi verður dentur lagdur á persónligar førleikar til sjálvstøðugt at taka ábyrgd og at sýna virkisanda til sjálvur at orða og loysa fakligar og sosialar uppgávur og trupulleikar. Afturat hesum verður dentur lagdur á tilvitan um góðsku og skapanarevni.

Námsætlanirnar fyri einstøku yrkislærugreinarnar síggjast í fylgiskjølunum í parti 9

## 3.4 Serskeið

Harumframt skal lærlingurin hava prógv frá góðkendum útbúgvingarstovni fyri hesi skeið (§ 8 í útbúgvingarkunngerðini):

1. Dugnaskapsroynd
2. Trygdarskeið
3. Radioskeið
4. Fyrstuhjálparskeið

Skúlin skipar fyri skeiðum og rindar skeiðskostnaðin. Serkeiðini eru partur av lærutíðini og ikki tíðini, ið er ásett til skúlaskeiðini.

# 4. Eftirmeting av skúlaskeiðum

Eftirmeting av einstøku skúlaskeiðunum er eftir hvørt skúlaskeið. Eftirmeting kann vera við støðumeti ella roynd, ið skúlin skipar fyri, um lærugreinarnar ikki eru endaligar. Luttøkuváttan kann tó latast fyri lærugreinar við minni enn 30 undirvísingartímum/40 pultstímum.

**Eftirmeting fyri almennar lærugreinar:**
Í alaraútbúgvingini eru 5 almennar lærugreinar og 2 almennar vallærugreinar. Hildin verður próvtøka í 2 almennum lærugreinum og 1 vallærugrein. Próvstovan ger av, hvørjar almennar lærugreinar skulu til próvtøku, eftir sama leisti sum á teimum gymnasialu breytunum. Um próvtøka ikki er í lærugreinini, verður endaliga ársmetið skrivað í prógvið.

Fyri at standa almennu lærugreinarnar og vallærugreinarnar skal lærlingurin hava í minsta lagi 02 í miðal í endaligum ársmetum og próvtøkum, um tær verða hildnar.

**Eftirmeting fyri yrkislærugreinar:**
Í alaraútbúgvingini eru 5 yrkislærugreinar. Próvtøka verður hildin í 2 yrkislærugreinum umframt sveinaroynd.

Próvtøka verður skipað sum munnlig próvtøka við fyrireikingartíð. Fyrireikingartíð og reglur um hjálparmiðlar er lýst í námsætlanini fyri hvørja lærugrein sær.

Fyri at standa yrkislærugreinarnar skal lærlingurin hava í minsta lagi 02 í hvørjari einstakari yrkislærugrein í endaligum ársmeti og próvtøku, um hon verður hildin.

# 5. Sveinaroynd

Sveinaroyndin er partur av sveinaroyndarskeiðnum, ið skúlin skipar fyri, og sum varir 10 vikur. Fyri at innskriva seg til sveinaroyndarskeiðið skal lærlingurin hava staðið 1. – 3. skúlaskeið, og hava góðkendan lærusáttmála sbrt. § 16, stk. 1 í kunngerð um felags reglur fyri yrkisútbúgvingar.

Umframt verkligu sveinaroyndina, fevnir sveinaroyndarskeiðið eisini um fyrireiking til sveinaroyndina, ið skúlin skipar fyri. Skúlin leggur til rættis tíðarætlan fyri sveinaroyndarskeiðið, ið lærlingurin fær útflýggjaða, tá ið hann verður boðsendur at møta.

Kunngerð um próvtøkur í yrkislærugreinum og fremjingarreglur fyri yrkis- og sveinaroyndir ásetur reglur um uppgávur, tilnevning av metingardómarum, ábyrgdarfólk og ansara.

Sveinaroyndin er býtt í tveir høvuðspartar: ein ástøðiligan part og ein verkligan part.

Í útbúgvingarkunngerðini er ásett, at meðan lærlingurin er á læruplássinum, skrivar hann saman við læruplássinum eina útbúgvingarbók, sum útgreinar, hvørji førleikamál eru rokkin tíðina á læruplássinum. Útbúgvingarbókin er partur av grundarlagnum undir verkliga partinum av sveinaroyndini. Skúlin ger nærri reglur um útbúgvingarfrágreiðingina, sum er í lidnu útbúgvingarbókini.

Skúlin hevur ábyrgdina av at leggja til rættis og fremja sveinaroyndina. Somuleiðis er tað skúlin, sum hevur ábyrgdina av at tryggja lærlinginum ta fyrireiking og vegleiðing, sum hann hevur krav uppá, meðan arbeitt verður við sveinaroyndini.

Lærlingurin fær 4 vikur tillutaðar til fyrireiking til sveinaroynd.

## 5.1 Ástøðiligi parturin av sveinaroyndini

Við endan av 3 skúlaskeiði ella áðrenn seinasta skúlaskeið, byrjar ástøðiligi parturin av sveinaroyndartíðarskeiðnum, sum er eitt viðkomandi ástøðiligt evni við eini sveinaroyndarfrágreiðing, sum skal leggjast fram, tann dagin verkliga sveinaroyndin verður hildin. Uppgávan, sum lærlingurin velur at arbeiða við, skal hava tilknýti til arbeiðið á læruplássinum og ikki bert vera ein ástøðilig ella lýsandi uppgáva.

*Próvtøkuháttur:*

- Ástøðiligi parturin av sveinaroyndini fevnir um sveinaroyndarfrágreiðingina og eina framløgu.
- Tíðarskeiðið er 4 vikur
- Framløgan er 30 minuttir, íroknað próvtalsgeving

*Døming:*

- Ein lærari og tveir metingardómarar døma ástøðiliga partin av sveinaroyndini.
- Eitt próvtal verður latið fyri framløguna, ið er ein heildarmeting av framløgu og verkætlan.
- Fyri at standa ástøðiliga partin av sveinaroyndini skal lærlingur í minsta lagi hava fingið próvtali 02 fyri royndina.

*Dømt verður eftir:*

lærlingurin dugir:

- at orða eina ætlan og áseta mál,
- at leggja til rættis og greiða úr hondum eina uppgávu innan eitt avmarkað arbeiðsøki á læruplássinum og
- at eftirmeta úrslitið í mun til ásett mál.
- at taka avgerð um, hvussu uppgávan kann loysast á læruplássinum og harvið vísa, at hann er førur fyri at meta, greina, hugsa, døma ella á annan hátt halda seg óheftan at uppgávuni, og mátanum sum uppgávan verður loyst uppá á læruplássinum.
- Tá ið lærlingurin orðar ætlanina, leggur til rættis og greiðir úr hondum uppgávuna og frágreiðingina, skal hann vera førur fyri at gera brúk av viðurskiftum úr ástøðiligu eins væl og verkligu upplæringini.
- vera førur fyri at gera brúk av viðurskiftum úr ástøðiligu eins væl og verkligu upplæringini, tá ið lærlingurin orðar ætlanina, leggur til rættis og greiðir úr hondum uppgávuna og frágreiðingina.

## 5.2 Verkligi parturin av sveinaroyndini

Verkligi parturin av sveinaroyndini er við støði í útbúgvingarbókini og verkligu lærumálunum, at lærlingurin kennir tær arbeiðsgongdir, sum eru í aling og tær tøkniligu og lívfrøðiligu bakgrundirnar fyri teimum arbeiðgongdum, sum eru viðkomandi í mun til tey evni í ástøðiligu sveinaroyndafrágreiðingini, næmingurin hevur valt at viðgera og eftirmeta.

*Próvtøkuháttur:*

- Verkligi parturin av sveinaroyndini er ein gjøgnumgongd av arbeiðsgongdunum á arbeiðsplássinum, har lærlingurin fær høvi at vísa og greiða frá teimum.
- Tíðarskeiðið at fyrireika og seta seg inn í/læra seg arbeiðsgongdirnar er 4 vikur
- Arbeiðsgongdin sjálv kann taka úr 1 upp í 3 tímar.

*Døming:*

- Ein lærari og tveir metingardómarar døma verkliga partin av sveinaroyndini
- Eitt próvtal verður latið fyri verkliga partin av sveinaroyndini.
- Fyri at standa verkliga partin av sveinaroyndini skal lærlingur í minsta lagi hava fingið próvtali 02 fyri royndina.

*Dømt verður eftir:*

at lærlingurin er førur fyri at útinna dagliga røkt av aliverum í øllum pørtum av framleiðslugongdini í tráð við galdandi regluverk, herundir fyri djóravælferð, umhvørvi og trygd.

og at lærligurin dugir at eftirkanna og viðlíkahalda tekniska framleiðsluútgerð á einum sjógvalibrúki ella á einari smoltstøð

Serligur dentur verður lagdur á tað evnið, lærlingurin hevur valt at viðgera í síni sveinaroyndarfrágreiðing.

*Nærri um sveinaroyndina:*
Tá ið uppgávuorðingin verður gjørd, skal læruplássið vera við, soleiðis at lærlingurin kann fáa stuðul og hjálp frá læruplássinum til arbeiðið við verkætlanini og fyri at tryggja, at til ber at viðgera uppgávuorðingina á læruplássinum. Her verður serliga hugsað um viðkvæmar upplýsingar v.m. Tá ið lærlingurin arbeiðir við verkætlanini, skal hann sostatt hava møguleika fyri at leita fram upplýsingar á læruplássinum ella á annan hátt at gera brúk av ítøkiligari vitan og upplýsingum frá læruplássinum í samband við verkætlanina.

Tí verður gjørdur ein sveinaroyndarsáttmáli, sum veitir trygd fyri, at arbeiðsgevarin góðtekur evnið og kann stuðla lærlinginum eftir tørvi. Somuleiðis veitir hesin sáttmáli trygd fyri, at vegleiðarar skúlans hava góðtikið evnið. Lærlingurin bindur seg somuleiðis til at skriva um ávísa evnið.

Í sambandi við sveinaroyndina skal skúlin leggja til rættis tað samskiftið og tíðarætlan, sum skal tryggja:

- at lærlingurin í samstarvi við læruplássið orðar eina uppgávuorðing,
- at uppgávuorðingin verður góðkend, og
- at lærlingurin fær vegleiðing frá skúlanum viðvíkjandi teimum yrkis- og ástøðiligu hugsanunum, sum lærlingurin ger sær, meðan hann arbeiðir við uppgávuni.

Eftir at uppgávuorðingin er góðkend av skúlanum, og sveinarroyndarsáttmálin undirskrivaður av øllum trimum pørtunum, hevur lærlingurin 4 vikur til at arbeiða við sveinaroyndini. Skúlin ásetur nærri, nær og hvar lærlingurin skal lata sveinaroyndarfrágreiðingina inn.

Meðan lærlingurin arbeiðir við sveinaroyndini, skal skúlin og frálæruútgerðin á skúlanum so vítt møguligt verða tøkt hjá lærlinginum í vanligari skúlatíð. Lærlingurin hevur krav upp á vegleiðing frá skúlanum sbrt. nærri ásetingum í undirvísingarætlanini hjá skúlanum, meðan hann arbeiðir við sveinaroyndini.

Sveinaroyndin eigur at verða løgd soleiðis til rættis, at metingardómari og lærari hava stundir at seta seg inn í hana. Skúlin skal tí, eftir at lærlingurin hevur latið frágreiðingina inn, skjótast gjørligt senda hana til metingardómaran at gjøgnumganga og fyrireika til ta munnligu próvtøkuna, ið lærlingurin eftirfylgjandi skal til.

Verkligi parturin av sveinaroyndini er ein tilrættaløgd vitjan á fyritøkuni, har lærlingurin fær høvi at greiða metingardómara frá ymsum arbeiðgongdum á fyritøkuni og vísa, at hann hevur teir førleikar, ið eru ásettir í útbúgvingarkunngerðini. Vitjanin endar við framløgu av sveinaroyndarfrágreiðingini, lærlingurin hevur arbeitt við síðstu 4 vikurnar.

## 5.3 Endaligt sveinaroyndarpróvtal

Endaligt sveinaroyndarpróvtal verður givið bæði fyri verkliga og ástøðiliga partin av sveinaroyndini og bæði koma í prógvið. Fyri at standa skulu bæði verkligi og ástøðiligi parturin standast hvør sær.

Lærlingurin verður mettur sambært hesum próvtalsstiga:

| Próvtal | Merking | Lýsing |
|---|---|---|
| 12 | Fyri framúr gott avrik | Próvtalið 12 verður givið fyri avrik,<br>sum lýtaleyst ella mest sum lýtaleyst lýkur málini. |
| 10 | Fyri sera gott avrik | Próvtalið 10 verður givið fyri sera gott avrik,<br>ið við onkrum smávegis lýtum lýkur flestu málini. |
| 7 | Fyri gott avrik | Próvtalið 7 verður givið fyri gott avrik,<br>ið við nøkrum lýtum, væl lýkur málini. |
| 4 | Fyri hampiligt avrik | Próvtalið 4 verður givið fyri hampiligt avrik,<br>ið hevur fleiri grov lýti og ikki lýkur málini væl. |
| 02 | Fyri toluligt avrik,<br>sum kann verða góðtikið | Próvtalið 02 verður givið fyri toluligt avrik,<br>ið akkurát stendur mát, og í minsta mun lýkur málini. |
| 00 | Fyri ikki nøktandi avrik | Próvtalið 00 verður givið fyri ikki nøktandi avrik,<br>ið ikki stendur mát og ikki lýkur málini. |
| -3 | Fyri heilt vánaligt avrik | Próvtalið -3 verður givið fyri heilt vánaligt avrik,<br>sum als ikki kann verða góðtikið. |

Tá ið liðugt er at próvdøma sveinaroyndina, skal oyðublað hjá Yrkisdeplinum við endaligu próvtølunum fyri hvønn lærling sær sendast til Yrkisnevndina/Yrkisdepilin.

## 6. Endurpróvtøkur og sjúkrapróvtøkur

Um lærlingurin gerst sjúkur áðrenn ella meðan sveinaroyndin er, og ikki er førur fyri at greiða úr hondum sveinaroyndina, áseta skúlin og yrkisnevndin eina sjúkrapróvtøku skjótast gjørligt eftir at lærlingurin er vorðin frískur. Um sjúka bert ávirkar annan partin av sveinaroyndini, so verður endurpróvtøka bert skipað fyri partin, sum lærlingur ikki fekk luttikið í vegna sjúku, t.d. um lærlingur hevur staðið ástøðiligu royndina, so verður endurpróvtøka bert skipað fyri verkliga partin av sveinaroyndini.

Um lærlingur ikki stendur sveinaroyndina, skulu metingardómararnir beinanvegin boða skúlanum og yrkisnevndini frá hesum, og geva eina stutta skrivliga frágreiðing um orsøkina til, at lærlingurin ikki stóð royndina. Metingarskjøl, sum eru útfylt á nøktandi hátt, kunnu góðgera frágreiðingina.

Skúlin skal hareftir skjótast gjørligt seta seg í samband við lærlingin og læruplássið fyri at fáa greiðu á, hví lærlingurin ikki stóð royndina, og fyri at greiða frá, hvørjar møguleikar lærlingurin og læruplássið hava, og fyri at finna út av, hvat skal gerast víðari. Um lærlingurin og læruplássið eru samd um, at lærlingurin skal fara til nýggja sveinaroynd, og lærusáttmálin gongur út, áðrenn lærlingurin hevur staðið sveinaroyndina, skal lærusáttmálin leingjast, soleiðis at hann er galdandi alla sveinaroyndina. Leinging av lærusáttmála verður gjørd á oyðublaði, ið er gjørt til hetta endamál. Umsókn um leinging av lærusáttmála verður send Yrkisdeplinum.

## 7. Kærumøguleikar

Í felagskunngerðini fyri yrkisútbúgvingar eru ásetingar um kærur av fyrisitingarligari avgerð í § 37, um próvtøku í almennum lærugreinum í § 37-41, og um yrkis- og sveinaroynd í § 42.

## 8. Gildiskoma

Námsskipanin er galdandi frá 10.10.2024 og er galdandi fyri alilærlingar, ið byrja læruna eftir 15.08.2022.

# 9. Námsætlanir til yrkislærugreinar í aliútbúgvingini

# Námsætlan 1. Aling av fiski

**Lærugreinabólkur: Yrkislærugrein**

**Torleikastig: Framkomiðstig**

**Vegleiðandi tímatal: 480**

## 1. Samleiki

*Aling av fiski* er ein lærugrein, har lærlingurin ognar sær vitan um gongdina frá lívfiski gjøgnum alla ringrásina í alingini umvegis tøku til døgurðaborðið hjá endaligu brúkarunum. Lærlingurin fær kunnleika um røkt og rakstur av ymsu sløgunum av aliútbúnaði við støði í umhvørvisligum, etiskum, lívfrøðiligum, tøkniligum og búskaparligum viðurskiftum. Lærugreinin skal geva lærlinginum førleikar at fremja burðardygga og trygga matframleiðslu. Lærugreinin skal birta undir umhugsni og medvit við at vísa á sambandið millum lívfrøði, tøkni og búskap innan náttúrugivnu karmarnar.

## 2. Endamál

Undirvísingin í *aling av fiski* hevur til endamáls, at lærlingurin:

- ognar sær grundleggjandi vitan um ymsu partarnar av alingini
- gerst førur fyri at skapa sær eina heildarmeting av lívsringrásini hjá alifiski
- lærir at røkja týðandi uppgávur í alivinnuni
- verður tilvitaður um áhaldandi menning og gagnnýtslu av tilfeinginum í framtíðini

## 3. Kjarnaøki

Í lærugreinini kemur lærlingurin at læra um lívfisk, rognaframleiðslu, smoltaling, aling á sjónum og tøku av alifiski. Lærugreinin viðger m.a. fiskalívfrøði, anatomi, fysiologi, djóravælferð, umhvørvi, sjúkufyribyrging og -viðgerð. Fóður og fóðring eru partur av økinum. Fiskaaling verður lýst í søguligum høpi. Góðska á alifiski og almenna regluverkið um aling av fiski verða viðgjørd og umrødd.

**Lívfiskur, rognaframleiðsla og smoltaling**

Kunnað verður um kynbótaarbeiðið og gransking innan hetta øki. Lært verður um tilgongdina, frá tí at lívfiskurin verður strokin til eygarogn, nýklakt yngul, startfóðring og smoltframleiðslu, til fiskurin er klárur at seta á sjógv. Vatngóðska, resirkulering og flutningur er partur av hesum økinum.

Týdningurin av dygd og stødd á fiski verður viðgjørdur, eins og ymsir hættir at stýra sjóbúning áðrenn útseting. Djóravælferð verður viðgjørd í hesum partinum.

**Aling á sjónum**

Kunnað verður um umhvørvisárin og egnaði støð til aling á sjónum. Lært verður um, hvønn týdning streymviðurskifti, hiti, veður og vindur hava fyri fiskin og alingina sum heild. Útseting av sjóbúnum fiski verður viðgjørd. Kunnað verður um dagliga røkt, trivnað, reinføri og smittufyribyrging. Lært verður um skynsama fóðring, hvussu fóðrað verður, ymisk sløg av fóðri og hvussu dálking verður fyribyrgd, um botnviðurskifti og hvørja ávirkan avlopsfóður og skarn kunna hava á náttúruna. Djóravælferð verður viðgjørd. Avbjóðingar av lúsaplágu verða viðgjørdar. Lært verður um lúsalívfrøði, ymsar mátar at avlúsa, herundir um  reinsifiskar. Felli og burturbeining av deyðum fiski verða viðgjørd. Framtíðin og nýggir hættir at ala verða umrødd.

**Tøka av alifiski**

Viðgjørd verður tøka úr aliringunum og hvønn týdning og hvørja ávirkan tilgongdin við tøku hevur á góðskuna á fiskinum. Lært verður um fyribyrging av strongd, um avlíving, blóðging og flutning til tøkuvirkið. Í allari tøkutilgongdini skal djóravælferðin havast í huga. Kryvjing, dygdar- og støddarflokking verða umrødd. Kunnað verður um nýtslu og ymsar vørur og vørubólkar umframt um flutning til endabrúkaran.

**Undirvísingin fevnir um:**

***Anatomi og fysiologi:***

Undirvísingin skal tryggja, at lærlingurin verður settur væl og virðiliga inn í anatomiina og fysiologiina hjá vanligu fiskasløgunum í alingini. Undirvísingin í anatomi fevnir um: skræðu, beinagrind, musklar, blóðskipan, táknur, sodningarskipan, sundmaga, kynsgøgn, sansir, nervaskipan og hormonskipan. Dømi verða givin um fysiologisku støðuna hjá laksafiski, og um hvussu javnvágarsamspælið millum fiskin og umhvørvið verður hildið uppi. Í undirvísingini verða hesar gongdir gjølla lýstar og viðgjørdar: evnaupptøka, evna- og orkuviðurskifti, evnaútlát, rørsla umframt lívfrøðilig javning í tilknýti til hormonir, nervaskipan og órinsskipan. Lærlingurin skal fáa kunnleika til at avgera sjóbúningarstig. Kunnað verður um broytingar í fiskinum í sambandi við sjóbúning. Lært verður um ymsar mátar at stýra sjóbúningartilgongdini. Dagførd vitan verður givin um nýtslu av ljósstýring í sambandi við sjóbúning.

***Fóðurlæra***

Í undirvísingini fær lærlingurin kunnleika um rávøruna, sum verður brúkt til alifóður og til framleiðslugongd í sambandi við framleiðslu av fóðri. Lærlingurin skal hava hollan kunnleika til øll fóðursløg, fóðursamansetingar og fóðurupptøku í fiskinum, fóður, fóðring og vøkstur á smoltstøðum og í sjónum. Lærlingurin skal duga at rokna fóðurnøgd og gera fóðringarætlanir fyri ymsu stigini í alingini. Dentur veður lagdur á framferðarhættir sum avmarka/burturbeina vandan fyri dálking av fiskafóðri í umhvørvinum.

***Sjúkur og sjúkufyribyrging***

Vanligar fiskasjúkur verða gjølla lýstar umframt vegir til smittuspjaðing. Lærlingurin skal kunnast um, hvussu strongd og vánalig umhvørvisviðurskifti kunnu økja um sjúkutíttleikan. Lærlingurin skal kunna grundgeva fyri og fremja tiltøk, sum minka um smittuvandan í alivinnuni, og kenna vanlig sjúkueyðkenni hjá fiski út frá broytingum í atburði, útsjónd og við at kanna innvølir. Lúsaplágan verður viðgjørd. Lærlingurin skal kenna tiltøk, sum tað almenna og vinnan sjálv seta í verk fyri at minka um sjúkutilburðir og duga at leggja ætlanir fyri koppseting av fiski.

***Góðska á alifiski***

Týdningurin av rættari góðsku á lidnu vøruni verður viðgjørt. Kunnað verður um, hvussu komið verður fram til røttu góðskuna gjøgnum alla tilgongdina í alingini herundir hvørji viðurskifti hava ávirkan á góðskuna. Kunnað verður um ymsar loyvisgóðkenningar (sertifiseringar).

***Almenna regluverkið***

Lærlingurin verður gjølla kunnaður um almenna regluverkið og um rættar mannagongdir at fyribyrgja smittuspjaðing og sjúkum. Kunnað verður um heilsu, trygd og umhvørvi hjá starvsfólkunum í alivinnuni.

***Nýggj fiskasløg og víðari menning av aling***

Lærlingurin skal fáa kunnleika til granskingarúrslit og royndir við nýggjum fiskasløgum, sum kunnu gerast týðandi partur í føroysku alivinnuni. Harumframt skal undirvísingin fevna um øll lívsstigini hjá hesum fiskasløgum frá rogni til tøkuføran fisk og um møguleikar og forðingar fyri lønandi aling. Rúm skal gevast fyri serligum eyðkennum og arbeiðsháttum, t.d. aling av øðrum tilfeingi í sjónum eitt nú tara, skeljum o.a.

## 4. Faklig førleikamál

Málið við undirvísingini er, at lærlingurin dugir:

- at gagnnýta sína vitan innan lívfrøði, evnafrøði og alisfrøði
- at greiða frá lívfrøðiligu, evnafrøðiligu og alisfrøðiligu viðurskiftunum í alivinnuni
- at gera nágreiniligar lýsingar av lívfrøðiligum viðurskiftum í alivinnuni við støði í royndum
- at læra sjálvstøðugt at orða møguleikar og loysa lívfrøðiligar avbjóðingar í alivinnuni
- at ogna sær lívfrøðiligar fortreytir fyri at meta um møguligar avleiðingar fyri umhvørvið, samfelagið og einstaklingin av tøknifrøðiligu menningini innan alivinnuna
- at læra at nýta sína vitan at taka støðu til egnar, vinnuligar og samfelagsligar avbjóðingar
- at útinna dagliga røkt av aliverum í øllum pørtum av framleiðslugongdini
- at fremja sítt arbeiði í tráð við galdandi regluverk
- at taka atlit til fiskavælferð og umhvørvi
- at taka upp og flyta aliverur
- at taka upp, handfara og beina fyri deyðum fiski á tryggan hátt sambært galdandi regluverki
- at brúka eina framleiðsluætlan í dagliga arbeiðinum á eini alistøð
- at taka royndir av fiski og fóðri, skjalfesta rakstrar- og umhvørvisviðurskifti og seta í verk tiltøk, ið eru grundað á eygleiðingar og mátingar
- at optimera fóðringina og at nýta eina fóðurskipan
- at hava umsjón við vøkstri og menningarstigi hjá aliverum
- at viga aliverur fyri at finna miðalvektina
- at eyðmerkja sjúkutekin hjá aliverum
- at greiða frá mest vanligu smittukeldunum innan fiskasjúkur og hvussu smittuspjaðing kann fyribyrgjast
- at meta um táknuheilsuna
- at fyrireika og hjálpa við koppsetingum av aliverum
- at kanna fyri snultarar og fremja eina lúsateljing
- at greiða frá hættum at fyribyrgja snultarum í aliringum og at útinna viðgerð móti snultarum
- at handfara burturkast samsvarandi galdandi reglum
- at handfara kóp og onnur djór, sum amast upp á alibrúk
- at kenna til og allýsa loyvisgóðkenningar

## 5. Reglulig eftirmeting

Einstaki lærlingurin skal eftirmetast ávegis í undirvísingargongdini. Regluliga eftirmetingin hevur til endamáls at menna undirvísingina og styrkja fakliga støðið í lærugreinini. Lærlingurin eigur at hava eina greiða fatan av støðu síni í mun til fakligu málini í lærugreinini og eigur at fáa vegleiðing um, hvussu og hvørjum arbeiðast skal við fyri at røkka málunum. Regluliga eftirmetingin verður skjalfest og kann gerast við munnligari og/ella skrivligari afturboðan til lærlingin.
Skrivlig avrik við næmingatíð à 50 tímar eru partur av regluligu eftirmetingini. Hesi kunnu vera royndir í starvsstovu og í náttúruni.

## 6. Próvtøka

Um próvtøka er í lærugreinini, er hon munnlig. Fyrireikingartíðin er umleið 25 minuttir, og tá eru vegleiðing og tilfarsútflýggjan íroknað. 2,5 próvtakarar verða próvhoyrdir um tíman, íroknað próvdøming.

Dentur verður lagdur á, at lærlingurin dugir at:

- skipa og bera svarini fram við nýtslu av fakligum málburði
- vísa fakligt innlit og yvirlit
- nýta týðandi fakligar partar í samband við settar spurningar
- at seta ókent tilfar í samband við kend greiðsluevni innan aling av fiski

Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av avrikinum hjá lærlinginum.

# Námsætlan 2. Alitøkni

**Lærugreinabólkur: Yrkislærugrein**

**Torleikastig: Framkomiðstig**

**Vegleiðandi tímatal: 360**

## 1. Samleiki

Alitøkni er ein lærugrein, har lærlingurin ognar sær vitan um framleiðslueindir og framleiðslustýringar innan alivinnuna og um viðlíkahald av hesum.

## 2. Endamál

Endamálið við undirvísingini í alitøkni er yvirskipað, at lærlingurin við atliti til trygd og á ein burðardyggan hátt

- fær djúpari innlit í nýtslu av tøkniligum útbúnaði og útgerð í alivinnuni, umframt at hann fær kunnleika til neyðugt viðlíkahald av útbúnaði og útgerð.
- fær hegni at brúka tøkniliga útgerð við støði í mátingum og royndum,
- lærir sjálvstøðugt at taka støðu til trupulleikar av tøkniligum slag á ástøðiligum grundarlagi,
- fær fortreytir fyri at meta um møguleikar og avleiðingar av tøknifrøðiligu menningini, og hvussu týdningarmikil menningin er fyri lønsemið í vinnuni.

## 3. Kjarnaøki

Í lærugreinini kemur lærlingurin at læra um tøkniútbúnað, um framleiðsluútgerð og um viðlíkahald og viðlíkahaldsskipanir til aling av vatnlivandi verum.

**Tøkni á landi**

**Flutningur av veskum og gassum**

Lærlingurin skal fáa hollan kunnleika til tær rørskipanir, sum eru í nýtslu og hann skal duga at rokna vatnferð og trykktap í mun til tjúkd av rørum v.m. Eisini skal lærlingurin kenna virknaðin av ymiskum sløgum av pumpum og blásarum.

**Vatnviðgerð og resirkulering (RAS)**

Frálæran fevnir um vatngóðsku á inngangandi vatni, partikkulreinsing, sóttreinsing, køling og

avgassing. Í hesum sambandi verður undirvíst um sóttreinsing, hita- og kuldaviðgerð og súrevnisútrokningar.
Lærlingurin skal fáa gjølligan kunnleika til allan útbúnað og útgerð, sum hevur við endurnýtslu av vatni at gera. Hann skal vita, hvussu eitt endurnýtsluverk er bygt upp, og hvussu tað virkar.

**Karskipanir**
Undirvíst verður um ymiskar karskipanir og fyrimunir og vansar í hesum sambandi. Lærlingurin skal duga at meta um, hvønn týdning lutfallið millum tvørmát og dýpi í kørunum hevur fyri reinførið. Yvirlit yvir tilrenningar- og frárenningarskipanir.

**Eftiransingarskipanir**
Lærlingurin fær kunnleika til ávaringarskipanir, ymisk sløg av mátarum, stýringsskipan og um samskiftið millum alistøð og vaktarhald.

**Alis-/evnafrøði í aling**
Undirvíst verður um orku, ellæru, elinnleggingar, mekanikk, vatnstreym og orkumiss og endurnýtslu av orku.

**Tøkni á alistøð á sjónum**
**Ringar, búður og nótir**
Sløg av ringum/búrum, ið finnast á marknaðinum, og fyrimunir og vansar við ymsu sløgunum. Framleiðsla av alinótum. Lærlingurin skal duga at skilja millum vanliga útgerð og útgerð, sum kann brúkast í harðbalnum øki.

**Tøkni til fóðring**
Undirvíst verður um ymisk sløg av tøkni, sum verður brúkt til fóðring.

**Bátar og flakar**
Lærlingurin fær vitan um arbeiðsbátar og onnur før, sum verða brúkt í aling.

**Fortoyningar**
Meginreglur um ankring, ymiskar skipanir av ankrum, blokkum, ketum, trossum og flotum og samanknýting av hesum. Lærlingurin skal duga at rokna út flotevni, kenna ávirkan av aldu, flóð og fjøru og av søkk og akkerstyngd.

**Streymviðurskifti**

Undirvísingin fevnir um sjóvarfall, streymsamlát (-simuleringar) og streymútrokningar, sum skulu vísa, hvussu streymviðurskifti kunnu vera ein møguleiki ella forðing fyri staðseting av alistøð á sjónum.

**Tøka og hagreiðing**

Undirvíst verður um tøku, blóðging og góðskumeting v.m., eins og um flutning av fiski á sjógvi, á landi og í luftini.

**Valfrí verkætlan**

Lærarin velur í samráð við lærlingarnar, um teir skulu gera eina verkætlan, sum teir arbeiða við í einum tíðarskeiði, ið svarar til í mesta lagi 20 frálærutímar. Arbeitt verður vanliga í bólkum og arbeiðið endar við eini frágreiðing, sum í vavi svarar til tvær vanligar starvsstovufrágreiðingar.

## 4. Faglig førleikamál

Málið við undirvísingini er, at lærlingurin:

- fær innlit í tøkni, útbúnað og útgerð í dagliga arbeiðinum í einum alianleggi
- dugir at greiða frá og brúka aliútgerð
- dugir at greiða frá prinsippunum í resirkuleringsanleggum
- dugir dagligt viðlíkahald, sóttreinsing, eftirkanning og viðlíkahald av útgerð og hølum eftir galdandi viðlíkahaldsætlan

## 5. Reglulig eftirmeting

Einstaki lærlingurin skal eftirmetast ávegis í undirvísingargongdini. Regluliga eftirmetingin hevur til endamáls at menna undirvísingina og styrkja fakliga støðið í lærugreinini. Lærlingurin eigur at hava eina greiða fatan av støðu síni í mun til fakligu málini í lærugreinini og eigur at fáa vegleiðing um, hvussu og hvørjum arbeiðast skal við fyri at røkka málunum. Regluliga eftirmetingin verður skjalfest og kann veitast sum munnlig ella skrivlig afturboðan til lærlingin.

Skrivlig avrik við næmingatíð à 50 tímar eru partur av regluligi eftirmetingini. Hesi kunnu vera royndir í starvsstovu og í alifyritøku.

## 6. Próvtøka

Um próvtøka er í lærugreinini, er hon munnlig. Fyrireikingartíðin er umleið 25 minuttir, og tá eru vegleiðing og tilfarsútflýggjan íroknað. 2,5 próvtakarar verða próvhoyrdir um tíman, íroknað próvdøming.

Fakliga grundarlagið eru tey lýstu kjarnaøkini og spurningar í hesum sambandi.

Til munnligu próvtøkuna eru hesir hjálparmiðlar loyvdir:

Í fyrireikingartíðini: Tilfar, sum hoyrir til próvtøkuspurningin, bøkur og annað tilfar, sum er brúkt í undirvísingini. Harumframt egnar uppskriftir, møguligar frágreiðingar og roknimaskina.

Undir próvhoyringini: Tað er loyvt próvtakaranum a

t styðja seg til próvtøkuspurningin og tilfar, sum hoyrir til próvtøkuspurningin, umframt tað, sum próvtakarin hevur skrivað í fyrireikingartíðini.

Próvtakarin fær ein próvtøkuspurning. Próvtøkuspurningurin skal vanliga hava neyvari undirspurningar umframt kend ella ókend fylgiskjøl (t.d. talvur, myndir ella tól). Verkætlanin skal við hóskandi tyngd vera partur av próvtøkuspurninginum, um hon er gjørd.

Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av avrikinum hjá lærlinginum.

# Námsætlan 3. Trygd og trygdarfatan

**Lærugreinabólkur: Yrkislærugrein**

**Torleikastig: vanastig**

**Vegleiðandi tímatal: 140**

## 1. Samleiki

Trygd og trygdarfatan er ein størri og størri partur av øllum arbeiðsgongdum í alivinnu sum aðrari vinnu. Hendan lærugreinin er ætlað at geva lærlingum eina grundleggjandi fatan av hugtakinum og hvussu hugtakið myndar alt arbeiðið í alivinnuni í dag.

## 2. Endamál

Endamálið við undirvísingini er yvirskipað, at lærlingarnir

a) fáa djúpri innlit í, hvat trygd og trygdarfatan vil siga fyri arbeiði á eini alifyritøku,
b) fáa hegni at arbeiða við og fylgja øllum mannagongdum, sum gera arbeiðsumstøðurnar tryggar,
c) læra, at hugtakið umframt teirra egnu arbeiðstrygd, eisini umfatar trygd og reinføri í samband við matvøruframleiðslu og matvørutrygd av laksinum, tá ið hann verður til matvøru.
d) fáa læru um serligu fortreytir fyri at arbeiða ítøkiliga við trygdini á sjónum í Føroyum. Her verður serliga hugsað um serligu streym- og alduviðurskiftini á føroysku firðunum og veðurlæru.

## 3. Kjarnaøki

### Trygd og trygdarfatan

Grundhugsanin er, at alt virksemi í einari alifyritøku, skal vera trygt. Allar arbeiðsgongdir í einari alifyritøku skulu endurspegla hesa hugsanina. Fyrst og fremst er sjálvandi týdningarmikið, at starvsfólkini, sum arbeiða í fyritøkuni, kunnu kenna seg trygg, tá ið tey fara til arbeiðis, duga at meta um bæði mekaniskar og náttúrugivnar vandar í arbeiðinum hjá sær. Allur rakstur skal vera tryggur og effektivur.

### Náttúruviðurskifti – Streymur, alda, veður og veðurlag

Rák og alda eru av avgerandi týdningi í sjógvalingini serliga. Fyri at duga at meta um, nær ráðiligt er at fara í gongd við arbeiðir, krevst hollur kunnleiki til aldu, rák og fjarðarrák. Tøkniliga er eisini

týdningarmikið at skilja, hvussu tøkniligar loysnir mugu tillagast náttúrugivnum viðurskiftum. Havfrøði, jarðfrøði og veðurlæra eru bulurin í hesum kjarnaøkinum fakliga og ein alis- og evnafrøðilig grundvitan krevst.

**Arbeiðstrygd - mannagongdir á arbeiðsplássinum, váðameting av arbeiðsgongdum, skráseting av vandum**

Hvussu verður ítøkiliga arbeitt:

Verndarútgerð

- Krøv til góðkenningar av verndarútgerð t.d.
- Hvat er CE góðkenning
- Hvat er EN góðkenning - hvør handski / ella filtur skal brúkast til ávíst kemikalir

**Skráseting av óhappum / nærumóhappum:**

- Læra at skráseta óhapp/nærumóhapp
- Læra um rættandi atgerðir fyri at fyribyrgja endurtøku av óhappum
- Kanning av óhappum, hvat var ”basis cause” til at óhappið hendi
- Beinleiðis orsakir / Óbeinleiðis orsakir til óhapp.

**Arbeiðstrygd - lóggáva og standardir**

Arbeiðseftirlitið, lóggáva um arbeiðstrygd og altjóða standardir á trygdarøkinum. Trygdarumboðan og fráboðanarskylda. Ein partur av hesum kjarnaøkinum er skeið fyri trygdarumboð, sum arbeiðseftirlitið bjóðar. Læknafrøðiliga verður eisini hugt at – deildini fyri arbeiðs og almannaheilsu - ymiskum arbeiðsstøðum og hvussu okkara kroppur ávirkast av skeivum arbeiðsstøðum.

**Arbeiðstrygd - máting og handfaring av kemikalium**

Nógv arbeiði í aling á sjógvi og landi umfatar handfaring av kemikalium. Í hesum kjarnaøkinum verður almen toksikologi gjøgnumgingin. Meira ítøkiliga skulu lærligarnir læra at lesa databløð og meta um, hvørja verndarútgerð teir skulu brúka at handfara ymisk kemikaliu.

**Matvøruframleiðsla, reinføri og trygd**

Fiskaaling er í síðsta enda ein matvøruframleiðsla. Reinføri er av stórum týdningi í allari tílíkari framleiðslu. Í fyrstu atløgu fyri at sleppa undan sjúkuspjaðing ímillum fisk og alibrúk og í síðsta enda fyri, at forbrúkarin, sum keypir fiskin, kann kenna seg tryggan at eta vøruna. Umframt almenna vitan krevur hetta vitan um smáverur.

## 4. Førleikamál

Málið við undirvísingini er, at lærlingurin dugir:

**Almenn**

Lærlingurin skal hava almenna vitan um rák og aldu og náttúrukreftirnar í Føroyum. Skilja mekanikkina í samband við arbeiðið við tungum tingum. Kenna mannakroppin og tær arbeiðsstøður, sum ikki eru góðar fyri hann. Smáverulívfrøði er partur av almennu vitanini í samband við matvørutrygd.

**Yrkis**

- At taka royndir av fiski og fóðri, skjalfesta rakstrar- og umhvørvisviðurskifti, og seta í verk tiltøk, ið eru grundað á eygleiðingar og mátingar.
- Greiða frá mest vanligu smittukeldunum í s.v. fiskasjúkur og hvussu smittuspjaðing kann fyribyrgjast.
- Dagligt viðlíkahald, sóttreinsing, eftirkanna og viðlíkahalda útgerð og høli eftir galdandi viðlíkahaldsætlan.
- Handfara burturkast samsvarandi galdandi reglum.
- At brúka útgerð at lossa, lasta og sleipa í alianleggum og á alibátum á tryggan hátt og í mun til galdandi regluverk.
- At greiða frá, hvussu rák, alda, veður og vindur ávirka arbeiðsumstøðurnar á sjónum.
- Brúka databløð fyri heilsu, trygd og umhørvi, og at nýta kravda verndar- og trygdarútgerð, og at verða ílatin eftir umstøðunum.
- Fremja arbeiðsuppgávur í alianleggum á ergonomiskt rættan hátt.

## 5. Reglulig eftirmeting

Einstaki lærlingurin skal eftirmetast ávegis í undirvísingargongdini. Regluliga eftirmetingin hevur til endamáls at menna undirvísingina og styrkja fakliga støðið í lærugreinini. Lærlingurin eigur at hava eina greiða fatan av støðu síni í mun til fakligu málini í lærugreinini og eigur at fáa vegleiðing um, hvussu og hvørjum arbeiðast skal við fyri at røkka málunum. Regluliga eftirmetingin verður skjalfest og kann veitast sum munnlig ella skrivlig afturboðan til lærlingin.

## 6. Próvtøka

Um próvtøka er í lærugreinini, er hon munnlig.

Um próvtøka er í lærugreinini, er hon munnlig. Fyrireikingartíðin er umleið 25 minuttir, og tá eru vegleiðing og tilfarsútflýggjan íroknað. 2,5 próvtakarar verða próvhoyrdir um tíman, íroknað próvdøming.

Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting.

# Námsætlan 4. Burðardygg gagnnýtsla

**Lærugreinabólkur: Yrkislærugrein**

**Torleikastig: vanastig**

**Vegleiðandi tímatal: 140**

## 1. Samleiki

Hugtakið burðardygd varð fyrstu fer lagt fram í Brundtland frágreiðingini 1987. Hendan lærugreinin skal geva lærlingum eina grundleggjandi fatan av hugtakinum og hvussu hugtakið myndar tilfeingisvinnurnar í størri og størri mun.

## 2. Endamál

Endamálið við undirvísingini í *burðadyggari gagnnýtslu* er yvirskipað, at lærlingarnir

- fáa djúpari innlit í, hvat burðardygg gagnnýtsla merkir sum hugtak.
- fáa hegni at brúka hugtakið í arbeiðnum á einum aliøki á sjónum ella einari smoltstøð,
- læra, at hugtakið er tvørfakligt og fevnir um bæði samfelag, búskap og lívfrøði
- fáa fortreytir fyri at arbeiða ítøkiliga við krøvum í samband við sertifisering av burðardyggum virksemi.

## 3. Kjarnaøki

### Burðardygd

Burðardygd er eitt tvørfakligt hugtak. Grundhugsanin er, at alt virksemi og gagnnýtsla av náttúruni skal vera soleiðis, at komandi ættarlið í minsta lagi hava somu møguleikar sum núverandi ættarlið. Lívfrøðiliga skal náttúrutilfeingi ikki troytast meira enn tað kann bera. Búskaparfrøðiliga skal virksemi kunna halda fram, so komandi ættarlið eisini hava gagn av okkara fyritakssemi, og samfelagsfrøðiliga og sosialt skal bæði land og nærsamfelag hava sum mest burturúr. Í heimsmálunum hjá ST eru nógv av hesum viðurskiftum útgreinaði í smálutir og tí eru tey eisini bulurin í hesum kjarnaøkinum.

### Náttúrutilfeingi í Føroyum

Fyri at kunna virka lívfrøðiliga burðardygt í Føroyum mugu vit kenna náttúrugrundarlagið í Føroyum. Føroyska náttúran. Hvussu sær hon út? Hvørji dýr, soppar, plantur og smáverur eru her og hvussu stór er framleiðslan í náttúruni sjálvari og hvussu ferðast evni í ringrás í náttúruni í Føroyum? Hvørji sløg egna seg væl at ala? Eru burðardygdarfyrimunir við taraaling, skeljadjóraaling og aling av fleiri sløgum saman?

**Gagnnýtsla**

Alivinna, fiskivinna, ferðavinna og landbúnaður eru allar tilfeingisvinnur. Undir hvørjum fyritreytum virka hesar vinnurnar í Føroyum? Hvussu sær framleiðslan út - frá náttúrutilfeingi til vøru á keypshillunum - serliga í alivinnuni? Hvussu tryggja vit okkum sum land í lóggávu, at alingin og framleiðslan eru burðardyggar?

**Rusk**

Frá eygarogni til tøkulaks eru nógvir liðir. Frá rávøru til søluvøru eru eisini nógvir liðir. Og í øllum liðum hevur framleiðslan við sær rusk. Ein týðandi partur av at kunna kalla virksemi burðardygt er handfaringin av ruski. Hvussu eru ringrásirnar av tilfari og vøru háttaðar? Verður tilfar úr framleiðsluni endurnýtt?

**Dálking**

Alivirksemi dálkar og regluverk ásetur, hvussu illa tað kann vera dálkað undir einum aliringi, áðrenn hann skal flytast. Lívfrøðiligt margfeldi minkar, tá ið náttúran verður dálkað og ymisk vísitøl verða brúkt, tá ið kanningar verða gjørdar undir ringunum. Hvussu máta vit dálking undir ringinum? Hvussu nógv dálkar framleiðslan og flutningurin í CO2? Er heilivágsnýtlan burðardygg?

**Fóður og avleitt CO2 útlát**

Í samlaða CO2 roknskapinum fyri laksaframleiðslu fyllir fóður nógv. Í hesum kjarnaøkinum verður hugt at fóðurframleiðsluni í mun til burðardygd og serliga CO2 útlátið. Hvørjar rávørur verða brúktar, hvussu verður framleitt og hvørja ávirkan hevur ymiskt fóður á laks og umhvørvi?

**Burðardygd í verki í alivinnu**

Av tí at marknaðir seta krøv til bæði lívfrøðiliga og sosiala burðardygd í framleiðsluni av laksi, er neyðugt at kunna skjalprógva burðardygd í framleiðsluni á ymsan hátt. Regluligar frágreiðingar, framleiddar eftir einum ávísum leisti, verða latnar certifiseringsstovnum. Lærlingurin skal kenna ymsar sertifiseringar og tað arbeiðið í alingini, sum er avleitt av hesum.

## 4. Førleikamál

Málið við undirvísingini er, at lærlingurin dugir:

**Yrkis:**

- Taka upp, handfara og beina fyri deyðum fiski á tryggan hátt og í mun til galdandi regluverk.
- At taka royndir av fiski og fóðri, skjalfesta rakstrar- og umhvørvisviðurskifti, og seta í verk tiltøk, ið eru grundað á eygleiðingar og mátingar.
- Greiða frá mest vanligu smittukeldunum í sambandi við fiskasjúkur og hvussu smittuspjaðing kann fyribyrgjast.
- Handfara burturkast samsvarandi galdandi reglum.
- Brúka og skilja databløð fyri heilsu, trygd og umhørvi.
- Greiða frá teimum yvirskipaðu krøvunum, sum marknaðurin setir til alivørur.
- Arbeiða sambært galdandi góðskuskipan, innaneftirliti, sertifiseringskrøvum og standardum.

**Faklig**

- At hava vitan um lívfrøði. Hetta merkir at lærlingurin skal skilja grundleggjandi tilgongdir í lívfrøðiligum vistskipanum. Lærligurin skal hava grundleggjandi vitan um lívið í sjónum, og skilja hugtakið burðardygd og týdningin av einari burðardyggari framleiðslu.

## 5. Reglulig eftirmeting

Einstaki lærlingurin skal eftirmetast ávegis í undirvísingargongdini. Regluliga eftirmetingin hevur til endamáls at menna undirvísingina og styrkja fakliga støðið í lærugreinini. Lærlingurin eigur at hava eina greiða fatan av støðu síni í mun til fakligu málini í lærugreinini og eigur at fáa vegleiðing um, hvussu og hvørjum arbeiðast skal við fyri at røkka málunum. Regluliga eftirmetingin verður skjalfest og kann veitast sum munnlig ella skrivlig afturboðan til lærlingin.

## 6. Próvtøka

Um próvtøka er í lærugreinini, er hon munnlig.
Fyrireikingartíðin er umleið 20 minuttir, og tá eru vegleiðing og tilfarsútflýggjan íroknað. 3 próvtakarar verða próvhoyrdir um tíman, íroknað próvdøming.

Fakliga grundarlagið eru kjarnaøkini, sum verða lýst í undirvísingarfrágreiðingini.

Til munnligu próvtøkuna eru hesir hjálparmiðlar loyvdir:

| | |
|---|---|
| Í fyrireikingartíðini: | Tilfar, sum hoyrir til próvtøkuspurningin, bøkur og annað tilfar, sum er brúkt í undirvísingini. Harumframt egnar uppgávur, møguligar frágreiðingar og roknimaskina. |
| Undir próvhoyringini: | Tað er loyvt próvtakaranum at styðja seg til próvtøkuspurningin og tilfar, sum hoyrir til próvtøkuspurningin, umframt tað, sum próvtakarin hevur skrivað í fyrireikingartíðini. |

Próvtakarin fær ein próvtøkuspurning. Próvtøkuspurningurin skal vanliga hava neyvari undirspurningar umframt kend ella ókend fylgiskjøl (t.d. talvur, myndir ella tól).

Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av avrikinum hjá lærlinginum.

# Námsætlan 5. Alibúskapur

**Lærugreinabólkur: Yrkislærugrein**

**Torleikastig: vanastig**

**Vegleiðandi tímatal: 100**

## 1. Samleiki

*Alibúskapur* er ein lærugrein, har lærlingurin ognar sær vitan um serligu búskaparligu viðurskiftini, ið eru galdandi innan alingina, har langa framleiðslutíðin og stóra likviditetsbindingin skapa serligar búskaparligar fortreytir.

## 1. Endamál

Endamálið við undirvísingini í *alibúskapi* er yvirskipað, at lærlingarnir

- fáa innlit í alisøguna, virðisketuna í aling og lógarverkið, sum eru galdandi fyri vinnuna
- fáa kunnleika til hugtøk og lyklatøl innan aling
- fáa kunnleika til aktuellar avbjóðingar innan alivinnuna
- kenna grundleggjandi búskaparlig viðurskifti
- fáa innlit í marknaðarviðurskiftini og í megatrends á marknaðinum.

## 1. Kjarnaøki

### Alisøga, virðisketa og lógarverk

Lærlingarnir skulu kenna til søguligu gongdina innan alivinnuna, bæði um búskaparligu gongdina í vinnuni og um ymiskar avbjóðingar í søguligu gongdini. Eisini skal hetta fevna um nýggjaru gongdina, har m.a. onnur sløg av aling taka seg upp.
Lærlingarnir skulu fáa eitt innlit í samlaðu virðisketuni í aling, frá rognum til lidna fiskin.
Lærlingarnir skulu fáa eitt innlit í lógarverkið og skilja, hvussu hetta er tillagað eftir søguligu avbjóðingunum og framtíðar ynskjunum um aðra aling.

### Hugtøk og lyklatøl innan aling

Lærlingarnir skulu kenna til mest nýttu hugtøkini og lyklatølini innan aling, t.d. FCR (Feed Conversion Rate), SFR (Specific Feeding Rate), SGR (Specific Growth Rate) og TGC (Termal Growth Condition).

**Aktuellar avbjóðingar innan alivinnuna**

Lærlingarnir skulu kenna til aktuellar avbjóðingar innan alivinnuna. Her kann t.d. verða talan um laksalúsina, um at ala longri á landi ella um at fara longri út við alingini. Her er eisini møguligt at tosa um nýggju sløgini av aling og um hvussu hesi ávirka hvønn annan.

**Grundleggjandi búskaparlig viðurskifti**

Lærlingarnir skulu kenna til grundleggjandi búskaparlig viðurskifti, s.s. eindarkostnaðin innan smoltframleiðslu og aling, um longu framleiðslutíðina, kapitalintensitetin o.l.

**Marknaðarviðurskiftini og  megatrends á marknaðinum**

Lærlingarnir skulu fáa eitt innlit í trends á marknaðinum, t.d. ávirkanin frá ASC (Aquaculture Stewardship Council) og Global Gap (Global G.A.P.).

## 4. Førleikamál

**Fakligir førleikar**

Málið við undirvísingini er, at lærlingurin dugir:

- at greiða frá virðisketuni í aling
- at greiða frá hvørjir faktorar hava ávirkan á framleiðslukostnaðin
- at greiða frá, hvat marknaðurin eftirspyr og skilir megatrends á marknaðinum

## 5. Reglulig eftirmeting

Einstaki lærlingurin skal eftirmetast ávegis í undirvísingargongdini. Regluliga eftirmetingin hevur til endamáls at menna undirvísingina og styrkja fakliga støðið í lærugreinini. Lærlingurin eigur at hava eina greiða fatan av støðu síni í mun til fakligu málini í lærugreinini og eigur at fáa vegleiðing um, hvussu og hvørjum arbeiðast skal við fyri at røkka málunum. Regluliga eftirmetingin verður skjalfest og kann veitast sum munnlig ella skrivlig afturboðan til lærlingin.

## 6. Próvtøka

Um próvtøka er í lærugreinini, er hon munnlig.
Fyrireikingartíðin er umleið 20 minuttir, og tá eru vegleiðing og tilfarsútflýggjan íroknað. 3 próvtakarar verða próvhoyrdir um tíman, íroknað próvdøming.

Fakliga grundarlagið eru kjarnaøkini, sum verða lýst í undirvísingarfrágreiðingini.

Til munnligu próvtøkuna eru hesir hjálparmiðlar loyvdir:

| | |
|---|---|
| Í fyrireikingartíðini: | Tilfar, sum hoyrir til próvtøkuspurningin, bøkur og annað tilfar, sum er brúkt í undirvísingini. Harumframt egnar uppgávur, møguligar frágreiðingar og roknimaskina. |
| Undir próvhoyringini: | Tað er loyvt próvtakaranum at styðja seg til próvtøkuspurningin og tilfar, sum hoyrir til próvtøkuspurningin, umframt tað, sum próvtakarin hevur skrivað í fyrireikingartíðini. |

Próvtakarin fær ein próvtøkuspurning. Próvtøkuspurningurin skal vanliga hava neyvari undirspurningar umframt kend ella ókend fylgiskjøl (t.d. talvur, myndir ella tól).

Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av avrikinum hjá lærlinginum.